# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

**90 ára føðingardagur**

Hósdagin 11. august verður Anna Hansen, Norðragøta, 90 ár.

Dagurin verður hildin heima hjá ommudótturini Maluni.

**75 ára føðingardagur**

Í morgin, 12. August, verður Martha í Geilini, Hvalba, 75 ár. Høvi verður at vitja Marthu frá kl 15.00 til kl 18.00.

†

Kunngjørt verður, at kæri maður, pápi, verpápi
og abbi okkara

**Lorry Jacob Mohr Feilberg**
ættaður úr Fuglafirði

andaðist í Keypmannahavn 5. august, 77 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni
í Kgs. Lyngby 12. august kl. 14.

**Bibi og børnini**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi,
tá ið kæri maður mín, pápi, verfaðir, abbi
og langabbi okkara

**Magnus E. Jacobsen**
á Sýnuni

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar og gávur.

Tøkk til røktarfólkini á Eysturoyar Ellis-og Røktarheimi
og heimahjálpirnar.

*Blíðar heilsanir*

**Maria, Páll, Katrin, Lena, Jón og Kári**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá kæri maður, pápi og verfaðir okkara

**Tummas Vilhelm**
**Klaksvík**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til øll, sum hjálptu.

*Vegna familjuna,*
**Margreta, Jens og Odda**



## HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ

Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin

"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo

**Dagurin**

**11. august. Hermann**. Einki kent halgimansnavn, men er komið upp í álmannakkan í staðin fyri Tiburtius. Navnið er týkst og merkir *hermaður.*

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum,
sum gjørdu mær 85 ára dagin í Hamrabyrgi
so hugnaligan. Takk fyri góðan mat og sangir,
og takk til tykkum, sum ringdu og sendu
mær heilsanir á annan hátt. Gud signi
tykkum øll.

**Signhild oman Tún**
**Froðba**

## Tøkk

Øllum tykkum mongu, sum á ymiskan hátt
gleddu meg og gjørdu mær 75 ára dagin
2. juli so hugnaligan, takki eg hjartaliga.

*Blíðar heilsanir*

**Karl Samuelsen**
**Kollafjørður**